*Sverre Midjord, býráðslimur á Tvøroyri:*

# Suðuroyggin bjóðar oljuvinnu vælkomna

*Tað er ikki spurningurin, um tað er Tvøroyri ella Vágur, sum standa á odda, tá frálandavinna - oljuvinna - fer at taka seg upp í Føroyum. Her er nokk til okkum øll, og tí mugu suðuroyingar standa saman sum ein maður og bjóða hesi vinnu vælkomnari*

Hetta sigur ein av býráðslimunum á Tvøroyri og verandi tingmaður valdur í Suðuroynni, Sverre Midjord við Sosialin, nú tað verður arbeitt miðvíst fyri at skapa eini komandi frálandavinnu góðar arbeiðsumstøður í Suðuroynni.

Sverre Midjord sigur, at tá Tvøroyrar Kommuna bjóðar Drelnes fram til útgerðarhavn, so merkir hetta ikki, at Tvøroyri einsamælt skal veita eini komandi frálandavinnu tænastur.

Tað, sum umræður, er at bjóða alla Suðuroynna fram sum komandi tænastuveitingarplass hjá eini komandi oljuvinnu. Suðuroyggin liggur næst oljuleiðunum hjá bretum skamt frá markinum og tað er um hesar leiðir, at oljufeløgini seta sítt álit á at finna olju á føroyskum øki. Tí er teinurin til Suðuroyanna tann stytsti, og tað er tí heilt natúrligt, at suðuroyingar arbeiða saman um at bjóða oljuvinnuni tær tænastur, sum hon fer at hava brúk fyri, sigur býráðslimurin og tingmaðurin. Hann heldur tað er ómetaliga umráðandi, at ikki tvøramenn og vágbingar fara at stríðast sínamillum, tí her verður nóg mikið til bæði økini.

Sverre Midjord stendur ikki einsamallur í býráðnum á Tvøroyri við hesi hugsan. Sosialurin skilur, at býráðið, sum herfyri legði út við at bjóða Drelnes fram sum útgerðarhavn, vónar, at Vágur eisini verður við í eini framtíðarætlan at bjóða Suðuroynna fram til oljufeløgini.

Herfyri samtykti býráðið á Tvøroyri at leggja økið á Drelnesi av til eina komandi útgerðarhavn. Ein nevnd varð sett at arbeiða víðari við málinum. Nú er so komið hartil, at skotska fyritøkan Seaforth Maritime undir vitjan síni í Føroyum eisini hevur verið gestur hjá Tvøroyrar Kommunu. Týsdagin varð høvi at vitja á Drelnesi umframt at hyggja at teimum facilitetum, sum eru í oynni og sum ein oljuvinna fer at hava brúk fyri, tað verið seg sjúkrahús, verkstaðir o.l. Eisini varð vitjað í Lopra.



*Drelnes er væl egnað til útgerðarhavn*

Skotska fyritøkan arbeiðir innan frálandavinnu og er endamálið við vitjanini er at kunna seg við viðurskiftini her og tess møguleikar at vera við til at stuðla føroyingum í at koma í gongd við frálandavinnu.

Millum gestirnar er Alistair McGormich, sum er serkønur í uppbyggjan og rakstur av útgerðarstøðum. Eisini er Graham Steward við. Hann er hálvur føroyingur og arbeiðir innan oljuvinnuna í Skotlandi. Hann er við í nevndini, sum Tvøroyrar Býráð hevur sett at arbeiða við Drelnesætlanini. Hinir limirnir í nevndini eru Pauli Einarsson og Johan Mortensen.

Sosialurin skilur, at tosað verður um at bjóða Vágs Skipasmiðju og verkstaðir har fram at tæna komandi oljuvinnu. Vinnurekandi í oynni vilja eisini vera við og arbeitt verður nú við at skráseta tær ýmsu tænastuveitingarnar.

Ætlanin er at leggja til brots í næstum og taka av tí avbjóðing, sum virksemi í sambandi við oljuvinnu er. Tá farið verður at bora í Lopra í næsta ár skal nógv arbeiði gerast, eitt nú skal brúkast nógv tilfar eitt nú sement, stál o.l. Borutgerðin fer at fylla nógv og skal pláss verða til einar hálvt hundrað konteynarar. Somuleiðis skal stórt øki kring borholið í Lopra planerast. Nú verður so roynt at fáa sum mest av arbeiði gjørt í oynni í sambandi við umrøddu boring.

jan



*Vágbingar hava skipasmiðju og verkstað, sum oljuvinnan hevur stóran tørv á. Her eitt seismikkskip á Vági*



*Sverre Midjord: Suðuroyingar eiga at arbeiða saman, tí frálandavinnan fer at seta stór krøv til alla oynna*



## Stovnan av fornminnisfelag og bygdarsavni í Nes kommunu

Fyri nøkrum árum síðan tók Mentunarnevndin í Nes kommunu stig til at seta á stovn fornminnisfelag og bygdarsavn í kommununi.

Ein fyrireikingarnevnd bleiv vald til at arbeiða víðari við málinum.

Fyrireikingarnar blivu gjørdar, men endaliga stovnsetanin er ikki enn vorðin veruleiki.

Nú hevur Mentunarnevndin so aftur átikið sær at fáa fornminnisfelagið og bygdarsavnið stovnað.

Í hesum sambandi verður stovnandi aðalfundur í fimleikarhøll skúlans leygardagin 25. november kl. 14.

Á stovnandi fundinum fer Jógvan I. Olsen at greiða frá fyrireikingararbeiðinum, og Arne Thorsteinsson fer at greiða frá løgarkarmum og stuðulsmøguleikum í slíkum førum.

Eisini verður orðið frítt, har allir luttakarar kunnu siga sína hugsan.

Fyrireikararnir ynskja, at øll taka væl undir við hesi ætlan, og vóna at síggja nógv fólk á stovnandi fundinum.

Í kommununi eru nógvir fornir lutir, sum verdir eru at varðveita.

Formaður í mentamálanevndini í Nes kommununi er Jancy Olsen.